**FERÐAFRÁSØGN** *Eydna Skaale • eydna@sosialurin*




# Mentanarlív

**Um list ella søga hevur tín áhuga, so eru nógvar perlur at síggja í London. Eingilskmenn eru sera stoltir av søguni, og søguligu støðini og søvnini eru óteljandi. Listin hevur somuleiðis sera góð kor. Listafólk úr øllum heiminum fara til London at ganga á skúlunum har, og listasøvnini eru mong.**









**Tate Modern**



Í einum risa stórum bygningi mitt í London, heldur Tate modern til. Hetta er eitt listasavn við modernistiskari list. Her er ein blandingur av gomlum og spildurnýggjum listaverkum, við listafólki úr øllum heiminum. Verk av kendum monnum sum Monet, Dalí, Picasso og Andy Warhole hanga her.

Bygningurin er í fleri hæddum við rullutrappum ímillum, stórum bókahandli og eini risa matstovu. Hæddirnar eru býttar upp í nýggj og eldri listaverk. Tað er ókeypis atgongd, men gjald verður tikið, um tú vilt inn at hyggja á tveimum teimum ovastu hæddunum.

### Listaverk

Av tí, at savnið er so stórt, við so nógvum ymiskum at síggja, so er tað heilt víst okkurt fyri øll. Nøkur verk vóru, sum serliga settu hugsanir í gongd og sum drógu fólk.

Einastaðni hekk eitt verk á bróstinum. Tað var eitt petti, sum var brotið av eini skúlatalvu. Á hesum brotna og gamla talvubitanum, hevði ein týskur lærari og filosofur við kriti skrivað nakrar hugleiðingar í einum skúla, einaferð fyrst í 70'unum.

-Vit vilja ikki verða kallað primitiv ella djór. Men hvussu kunnu vit kalla okkum siviliseraði menniskju, tá vit eta okkum mett hvønn dag og sova væl hvørja nátt, væl vitandi um, at ein triðingur av heiminum gongur svangur, uttan at hava nakað stað at búgva. Við okkara líkagleði og okkara vulgæru greði eftir at verða siviliseraði, prógva vit jú, at vit júst ikki eru tað.

Nakað soleiðis stóð skrivað. Hetta fekk fólk í hópatali at steðga á, og hugsa eina løtu.

Eitt annað verk var ein stuttfilmur, sum vardi einar 3 minuttir. Vit sóu ein mann leggja nakrar fruktir í eina skál og seta hana á borðið. Síðani sóu vit frugtirnar rotna so spakuliga. Fruktin gjørdist fyrst rukkut, síðani byrjaði hon at gerast loðin. Síðani sóu vit, at kykt komu og løgdu egg, og at enda, at alt skreið skart. Tá filmurin var liðugur, var einki eftir í skálini. Filmurin koyrdi umaftur og umaftur, og eisini her støðgaðu nógv fólk á og vórðu standani eina løtu burturi í egnum tonkum.

Til eitt rúm var long kø. Bert 10 fólk sluppu inn í senn, tí listaverkið inni var so skoypiligt. Tá eg kom innar og sá verkið, fann eg hvørki høvd ella hala í tí. Ein vanlig, veik ljóspera hekk niður úr loftinum, og rundanum hana hekk órudd og skrambul av øllum møguligum slagi. Tað minti mest um at koma inn í ein óruddiligan kjallara. Heilt inni við ljósið hekk ymiskt smátt leikutoy. Dukkur, við ongum ørmum, illa farnir actionmenn, bóltar o.s.fr. Uttanfyri tað, hingu ymisk størri ting: rustaðar súkklur, kruvdir gummistivlar, klæðir av ymsum slag, vatnslangur og havaamboð. Allar uttast hingu so nakrir stórir bjálkar og fjalir. Eg gekk runt og runt um hetta sveimandi listaverkið, sum fylti alt rúmið, og undraðist á hvat hetta mundi vera. Fann ikki nakran boðskap, hóast eitt serligt huglag merktiskt týðiliga. Men tá eg sá navnið á verkinum, klárnaði fyri mær. Stuck in Time, æt tað. Tað lýsti gomul minnir, sum bara hingu púra still og sveimaðu, onkustaðni í gloymskuni.

### Alt at síggja

Tate modern hevur eitt systir savn, sum hevur meira klassiska list. Runt um í London eru somuleiðis í hundratalið av øðrum søvnum.

Um skip hava tín áhuga, so er í London stórt skipasavn, við gomlum seglskipum, heilt frá tíð Nelsons. Har er eisini savn við nýggjastu lampulistini! Har eru søvn við Sherlock Holmes, Charles Darwin, filmslist, gomlum klæðum, ja eg kundi hildið á.

Har eru nógv áhugaverd søgulig støð at vitja, t.d. Stonehenge, sum flestu fólk munnu hava sæð myndir av. Bath, sum eru leivdirnar av einum rómverskum spa og the Tower of London, fyri bert at nevna nøkur. Har eru gomul slott og borgir so tað forslær.

Allastaðni í býnum liggja faldarar við tilfari um alt hetta ymiska sum er at síggja, og plakatir og reklamur eru somuleiðis allastaðni. Søvnini eru sum oftast sera løtt at finna, um tú bert veist í hvørjum umráði tey eru. Til nærum øll tey størru søvnini eru leiðbeinandi skelti, sum bert skulu fylgjast.

Inni á slíkum søvnum kanst tú ganga ein heilan dag, um tú veruliga vilt geva tær far um hvønn einstakan merkislut. Tí er best ikki at vera í tíðarneyð, um tú vilt hava so nógv burturúr sum gjørligt.




VINN FERÐIR TIL LONDON



Kennir tú London?

Sosialurin hevur vitjað stórbýin London, og har hevur ein av okkara blaðkvinnum verið runt og sæð, hvat enski høvuðsstaðurin hevur at bjóða. Tað fer hon at greiða frá her í blaðnum, og vit geva tær eisini møguleikan at uppliva henda spennandi bý. Sosialurin skipar nevnliga fyri einari kapping millum lesararnar, har vit burturluta 10 ferðir til London. Hvørja viku draga vit um tvær flogferðir við Atlantic Airways til London.

**Kappingarreglar:**
Kappingin byrjar fríggjadagin 28. mai og heldur fram í fimm vikur. Teir fimm fríggjadagarnar prenta vit eina grein um London, og vit seta eisini tríggjar spurningar, sum tit skulu svara. Tey, sum svara spurningunum, og senda svarini til Sosialin, eru við í lutakastinum um ferðirnar. Svarini skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin eftir, at teir hava verið í blaðnum. Loyvt er ikki at senda avrit av síðuni úr Sosialinum, tí bert veruligar blaðsíður kunnu brúkast í kappingini.



Sosialurin ATLANTIC AIRWAYS

*Vinnarin í seinastu viku:*
Jóhan P. Magnussen
Onundarvegur 5
360 Sandavágur

ATLANTIC AIRWAYS

Navn á luttakara:

Bústaður:

**Klipp lepan út og send til Sosialin**

Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801
Sosialurin

Ein handil er inni í Tate modern. Hvat slag av handli er tað?
1 Svar:

Hvagani eru listafólkini, sum sýna fram í Tate modern?
2 Svar:

Hvussu eitur staðið, har leivdirnar av einum rómverskum Spa eru?
3 Svar: